# Planet

Barbara Holm
barbara@sosialurin.fo





# Sir Elton John á Tórsvølli

**TÓNLEIKUR Í summar fáa føroyingar møguleikan at uppliva heimskenda bretan Sir Elton John, tá ið hann trínur á pall á Tórsvølli**

Í summar verður høvi hjá føroyingum at uppliva eina heimsstjørnuna, sum ivaleyst telist millum størstu solistarnir í heiminum. 63 ára gamli Sir Elton John hevur selt meira enn 250 milliónir fløgur, og hevur í síni 40 ára longu karrieru avrikað meira enn tey flestu.

Hann hevur vunnið fimm Grammy Awards, eina Acadamy Award, eina Golden Globe Award og eina Tony Award. Í 2008 bleiv hann valdur sum mest eydnuríki solisturin í heiminum av viðurkenda tónleikablaðnum "Billboard – Hot 100 Top All Time Artist".

## Byrjaði í lokalari pub

Eins og nógvir tónleikarar í heimssøguni, so byrjaði Sir Elton John 15 ára gamal á einari lokalari pub og hotelli, í hansara heimbýi í Onglandi. Eftir fleiri royndir at gerast forsangari í ymsum bólkum í Bretlandi, hitti Sir Elton John í 1967 Bernie Taupin, og tað gjørdist byrjanin til eitt fleiri ára samstarv.

Bernie Taupin skrivaði tekstir, meðan Elton John skrivaði løgini, og síðani sendi tey til Taupin, og í 1967 bleiv fyrsta lag teirra "Scarecrow" útgivið.

Í 1968 lat Elton John fyrstu singleplátuna út við heitinum "I've Been Loving You". Í 1969 kom enn ein singlepláta "Lady Samantha", og fløgan "Empty Sky" út á gøtuna. Hóast framúr ummæli, so seldi pláturnar ikki serstakliga væl.

Í 1970 tók hansara tónleika karriera veruliga dik á seg, og tað árið komu tvær fløgur út frá solistinum.

Síðani tá hevur hann útgivið 26 fløgur, og 5 fløgur við filmstónleiki. Her kann nevnast eitt nú Disney teknifilmurin Lion King, har allur tónleikurin í filminum er framleiddur av Sir Elton John.

## Tónleikavinnan vindur uppá seg

Seinastu árini er tað vorðið mest sum gerandiskostur, at føroyingar bjóða heimsstjørnum til Føroya. Seinastu árini hava vit havt stjørnur sum Melanie C, Nephew, Scorpions, Bryan Adams, Kris Kristofferson og mong onnur, og í ár kunnu føroyingar gleða seg til Westlife í Klaksvík og Elton John á Tórsvølli.

Five Star Entertainment hevur frammanundan bjóða føroyingar konsertir við heimsstjørnum sum Kris Kristofferson og Bryan Adams. Í ár verður so tann størsta konsertin sum Five Star hevur bjóðað til, nevniliga Sir Elton John á Tórsvølli 29. juni.